## Stevna Ford

Í gjár byrjaði eitt rættiliga sjáldsamt rættarmál í argentinska høvuðsstaðnum Buenos Aires.

Á ákærubonkinum sita umboð fyri amerikonsku bilverksmiðjuna Ford, og teir skulu svara, hví Ford samstarvaði við tað sera harðrenda hernaðarstýrið, sum ráddi í Argentina frá 1976 til 1983. Eisini skulu teir greiða frá, hvat varð av teimum 16 fakfelagsleiðarunum, sum hvurvu beint eftir hernaðarkvettið í 1976, og sum vórðu píndir í hølunum hjá verksmiðjuni. Avhoyringar seinni hava víst, at fleiri av fakfelagsleiðarunum vórðu tveittir í havið úr tyrlum.

Skjøl, sum eru komin undan kavi, vísa, at amerikonsku myndugleikarnir vistu um tað, sum fór fram á bilverksmiðjunum í Argentina. Tann 13. apríl í 1976 sendi amerikanska sendistovan í Buenos Aires eitt fjarrit til Washington, har hon greiddi frá, at hermenn høvdu lagt á verkfalsmenninar á bilverksmiðjunum, og at átakið var væleydnað.

Eisini í Brasil eru fólk í ferð við at fyrireika rættarmál ímóti bilverksmiðjum, sum samstarvaðu við hernaðarstýrið har. Tað snýr seg um svensku fyritøkuna Scania, men Chrysler, Volkswagen og Firestone kunnu eisini vænta at verða drigin í rættin í Brasil.

## Keglast um dómarar

Í USA hevur George W. Bush, forseti, biðið Senatið góðkenna sjey fólk, sum hann hevur skotið upp at velja til dómarar. Upprunaliga skuldu teir setast í starv longu undir tí fyrra forsetaskeiðinum hjá Bush, men tí forðaðu demokratarnir fyri, so nú roynir forsetin aftur.

Men hóast republikanararnir hjá forsetanum hava meiriluta í Senatinum, er tað als ikki vist, at forsetin fær sín vilja. Skipanin hjá Senatinum loyvir minnilutanum at halda orðaskiftinum gangandi fyri at forða einari atkvøðugreiðslu, og alt bendir á, at demokratarnir ætla sær at brúka hendan møguleikan. Republikanararnir kunnu ikki forða tí, tí tað hevði kravt undirtøku frá minst 60 senatorum, og teir hava bara 55.

Demokratarnir vilja ikki góðkenna øll dómaraevnini hjá forsetanum, tí teir halda tey vera alt ov konservativ, men eygleiðarar halda, at tvídrátturin nú er bara fyrireiking til orðaskiftið, sum verður, tá amerikanski hægstirættur skal hava annan dómara fyri tann 80 ára gamla William Rehnquist, sum væntandi fer at leggja frá sær í summar, skrivar AP.

## Slangur í bankanum

Ein maður í Suðurafrika er funnin sekur í drápsroynd, eftir at hann slepti fimm eiturslangum leysum inni í einum banka í býnum Johannesburg.

Tað var í januar í fjør, at Abel Manamela fór inn í Absa-bankan. Hann og bankastjórin høvdu verið á rokinum um eitt lán, men nú hevði Abel Manamela mist tolið, og tá hann kom inn í bankan, legði tær fimm slangurnar á diskin og hótti starvsfólkini. Í ruðuleikanum beit ein av slangunum ein vaktarmann, og hann mátti flytast á sjúkrahús alt fyri eitt.

Løgreglan ákærdi tann illa mannin fyri drápsroynd. Dómarin var samdur við løgregluni, men hann segði seg kortini skilja Abel Manamela, tí eftir dómarans tykki hevði bankastjórin verið sera ólagaligur. Kortini kendi hann seg noyddan at døma Manamela, tí sjálvt um hann hevði grund til at vera misnøgdur við framferð bankans, kundi hann ikki taka málið í egnar hendur, soleiðis sum hann gjørdi, segði dómarin.

## Kirkenes rætta staðið

Norska stjórnin hevur gjørt av at skipa ein serligan Barentsstovn, men í seinastuni hevur orðaskifti verið um, hvar stovnurin skal halda til.

Stjórnin hevur skotið upp, at stovnurin skal halda til í Kirkenes, men undir einari hoyring í Stórtinginum herfyri kom fram, at fleiri halda Tromsø vera tað betra valið. Ein teirra er stjórin á veðurgranskingarstovninum, Pål Prestrud. Undir hoyringini segði hann, at tað hevði verið skilabetri at bygt Barentsstovnin í Tromsø, tí har hevði stovnurin fingið ágóða av tí fakliga kunnleikanum á lærda háskúlanum í býnum og pólgranskingarstovninum.

Stjórnin í Oslo hevur ikki gjørt nakrar viðmerkingar til orðaskiftið, sum hevur tikið seg upp, men væntandi fer stjórnin at halda uppá, at Barentsstovnurin skal halda til í Kirkenes, skrivar Nordlys.

UTTAN ÚR HEIMI

# Sluppu ikki at síggja nakað

**Útlendsku diplomatarnir og tíðindamenninir, sum vóru bodnir til usbekiska býin Andisjan at kanna, hvat veruliga er hent har, sluppu ikki at síggja nakað**

KANNINGARFERÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir útlendsku diplomatarnir og tíðindamenninir sluppu eina bussferð ígjøgnum Andisjan, men sambært tíðindamonnunum høvdu bussurin og ferðaleiðararnir so stóran skund, at tað bar als ikki til at gera sær eina mynd av tí, sum hent var.

Tað tykist rættiliga sannlíkt, at fleiri hundrað fólk lógu eftirá, tá hermenn skutu inn í eina mótmælisgongu í Andisjan fyri einari viku síðani. Tíðindini fingu altjóða samfelagið at krevja, at teir usbekisku myndugleikarnir lótu útlendsk umboð sleppa at kanna málið, men diplomatarnir og tíðindamenninir, sum vórðu bodnir til býin, fingu lítið og einki burturúr, skrivar norski tíðindamaðurin Halvør Tjønn. Tað einasta, sum teir sluppu at vitja, var eitt fongsul og ein almennur umsitingarbygningur, og so sluppu teir at tosa við nøkur umboð fyri myndugleikarnar.

Diplomatanir og tíðindamenninir høvdu ætlað sær at vitja ein skúla, tí mótmælisfólkini hava sagt, at hermenninir høvdu savnað umleið 500 lík í skúlanum. Men tey útlendsku umboðini sluppu ikki at vitja skúlan.

Diplomatarnir og tíðindamenninir sluppu heldur ikki at tosa við fólk á gøtuni í Andisjan. Tíðindastovurnar skrivaðu í gjár, at nógv fólk vóru komin saman uttan fyri eitt sjúkrahús, tí tey vildu hava at vita, hvussu tað stóð til hjá fleiri, sum vórðu særd, tá hermenninir skutu inn í mótmælisgonguna.

# Eiga at endurbyggja World Trade Center



*Donald Trump almannakunnger uppskotið um at byggja World Trade Center uppaftur*

*Mynd: Reuters*

**Tvíburðartornini í New York, sum rapaðu tann 11. september í 2001, eiga at verða bygd uppaftur, heldur kendi byggiharrin og sjónvarpsmaðurin Donald Trump**

BYGGING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Líka síðani atsóknina at World Trade Center hava myndugleikarnir í New York kjakast um, hvat skal gerast við staðið, sum tey bæði tornini stóðu á. Herfyri varð so avgjørt at byggja ein bygning, sum skal fáa heitið Freedom Tower ella Frælsistornið á staðnum.

Men øll eru ikki so fegin um ta ætlanina, og ein teirra er tann kendi byggiharrin og sjónvarpsmaðurin Donald Trump. Á einum tíðindafundi fyrradagin almannakunngjørdi hann sítt egna uppskot, sum er at byggja tvey torn av sama slagi sum tey bæði tvíburðartornini. Annað teirra verður eftir ætlanini 566 metrar høgt og sostatt heimsins hægsti bygningur.

Blaðið Wall Street Journal mælti herfyri býarmyndugleikunum í New York til at lata Donald Trump koma við einum uppskoti um, hvat skal gerast við Grund Zero, har World Trade Center stóð. Blaðið vildi vera við, at býarmyndugleikarnir hava svikið í ólukkumát í hesum máli. Tað heldur Donald Trump eisini, og hann heldur uppskotið um eitt Freedom Tower vera heilt burturvið.

– Vit eiga at byggja eitt størri, sterkari og vakrari Worlæd Trade Center. Tað er tað, fólk vilja hava, sigur hann.